

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 12 - 2011

# Libyska framleiðslan veksur skjótt

Tað hevur gingið sera væl at fáa gongd á libysku oljuframleiðsluna, sum steðgaði upp undir borgarakrígnum fyrr í ár. OPEC-formaðurin, Abdullah El-Badri, segði í gjár, at Libya framleiðir nú umelið eina millión tunnur av olju um dagin, og at í øðrum ársfjórðingi næsta ár verður hon ætlandi líka stór sum fyri borgarakríggið. Oljuráðharrarnir í OPEC-londunum hildu fund í Wien í gjár, og teir umrøddu millum annað gongdina í Libya. Aftan á fundin segði El-Badri, at gongst sum nú veksur libyska framleiðslan 300.000 tunnur í fyrsta ársfjórðingi í 2012 og so aðrar 300.000 í øðrum ársfjórðingi. Libya var eitt av teimum týdningarmestu oljulondunum undan uppreistrinum ímóti Muammar Gaddafi, men borgarakríggið steðgaði framleiðsluni.